# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Lívdin Í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldi kl. 21 verður ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti har Sonni Poulsen talar,
kl. 11.30 samfelagsløta,
kl. 12 tilbiðjunarmøti har Jógvan talar um evnið »Frá steinhjarta til kjøthjarta« 3. partur, kl. 12 sunnudagsskúli. Undir báðum møtunum er barnaansing.
**Á Brekku 3**
Týskvøldið kl. 20 Møti við undirvísing um evnið »Andalig búning«
www.livdin.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 bíbliugransking og barnabíbliutími. Kl. 11 gudstænasta, Jens V. Danielsen.

**Katólska Kirkjan**
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Finn Arvé, presti í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14. www.katolsk.fo

**Sangarar til Hoyvíkar kirkju**
Hevur tú hug at stuðla sálmasangin ein halgidag um mánaðin í Hoyvíkar kirkju, so set teg í samband við organistin á tlf. 319748/589421.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Johan Henriksen.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustrætі**
Fríggjadagin kl. 7 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Símin Absalonsen, kl. 14 sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 17.15 venur barnakórið, kl. 20 bønamøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Ebenezer**
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans.
Kl. 12.00 Sunnudagsskúli.
Kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Fríggjadagur 30. nov. kl. 20. Ungdómsmøti.
Sunnudagur 2. des. kl. 11 Sunnudagsskúli. Lusiagongd verður vant aftaná.
Sunnudagur 2. des. kl. 18, Møti við Tom Skaale, Tórshavn. Evni: Lóg og evangelium
Mánadagur 3. des. kl. 20 Kvinnubólkurin møtir seinastu ferð í ár. Evni: Søgan um "Crying Wind" indianarargentuna, hvørs gudur var vindurin. Leiðin var long og strævin, men at enda fann hon hin livandi og alvaldandi Gud. Allar kvinnur eru vælkomnar! Øll hjartaliga vælkomin!
Sí annars www.koma.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygarkvøldið einki Flare.
Sunnumorgunin kl. 10.45 Morgunmøti v/ Alex O'Campo. Kl. 11.30 Barnagudstænasta
www.filadelfia.fo

**4. Grein Skótar**
Jólahugni verður 3. des. kl. 19.30 í KFUK.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin 2. des. í KFUK: Adventsveitsla. Inngangur við Hanusi Simonsen presti. Kristiliga sangkórið syngur.
Mánadagin 3. des. kl. 15 í KFUK: Seinnapartssamkoman, Herluf Heinesen sigur frá um ferð í Nigeria.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.
http://www.gospel.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 2. december kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30 Samvera við drekka.
Kl. 12.00 Sunnudagsskúli og møti. Rodmundur í Liða talar.
Sunnudagsskúlin er hvønn sunnudag kl. 12.
Øll børn eru hjartaliga vælkomin.
Týsdagin 4. december kl. 19 BeTwix.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti. Sunnudagsskúli kl. 14.
Møti kl. 18.
suppa, sápa og frelsa síðan 1865.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl. 18 Møti, har messiansk jødisku hjúnini Lisa og David Loden tala og syngja.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Havn**
Leygarkvøldið 1. desember kl. 19.30 jólamøti fyri kvinnur og menn í Evangeliihúsinum. Oddvør & Hans Jacobsen tala, og Oasubrøður syngja.
http://www.aglow.fo

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.
Barnavinarligt møti verður kl. 18. Edith Johannesen tosar og gentur syngja. Drekka aftaná.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Sunnudagin 2/12, morgunmøti við breyðbróting kl. 11. Verið vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14 og møti kl. 18.
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.
Bønarløta hóskvøldið kl. 19.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 17 Møti.

**Berøa, Saltangará**
Leygardagin 1.12.2007 kl. 20 - 23 »Løta fyri ung« frá 6. fl. og eldri.
Sunnudagin 2.11.2007 kl. 11.30 Breyðbróting og sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangeliskt møti.
Mikudagin 5.12.2007 kl. 19.30 Bønar og uppbyggingarmøti.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli. Onki møti vegna jólakonsert í ítróttarhøllini.

**Sjómannskvinnuringurin á Skála**
kemur saman í Meinigheitshúsinum 2.12. kl. 19.30 til jólahugna. Menn syngja. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Keldan, Skálafirði:**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Jens M. Petersen úr DK og Beintu Joensen.
Sunnudagin kl.17, Møti við Bjartu og Trúgva Petersen. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur 30. nov. kl. 21 Ungdómsmøti – Tala: Bogi Olsen.
Sunnudagin kl. 17 Sunnudagsskúli og kl. 17 Møti: Tey ungu luttska við vitnisburði og sangi. Innsamlað verður til arbeiði í húsinum.
Mikumorgun 5. des. kl. 6 Bønarløta, kl. 20 Bíbiltími – Evnið: hvat sigur bíblian um einglar og illar andar? v/ Torleif Johannesen.
Hósdagur 6. des. kl. 20 Bønarløta. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tabor Toftir**
Hey tit, vælkomin til opið hús leygarkvøldið tann 1. des kl. 21 og 2. des. til Sunnukvøldsmøti kl.18.
Øll hjartaliga vælkomin ;)

**Sjómanskvinnuringurin í Runavík**
kemur saman í kvinnufelagshúsinum til jólahugna mánakvøldið kl. 19.30. Havi pakka við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Barnaringurin á Strondum**
hevur útsølu í missiónshúsinum leygardagin 1. desembur kl. 10. Jóladekoratiónir, bókaborð o.m.a.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Møti sunnudagin 2-12-07 er avlýst vegna gospel konsert.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 koma jødisku hjúnini David og Lisa Loden at syngja og tala. Tey greiða eisini frá teirra arbeiði. Tulkað verður til føroyskt. Innsavnan.
Sunnudagsskúlin er sunnudagin í kirkjutíð kl. 11 í kirkjukjallarinum. Møti verður sunnukvøldið kl. 18, har Margeir Toftegaard talar.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Leygardagin kl. 20 Opið hús. Sunnudagin kl. 18. Tofta/ Rituvíkar blákrossfelag skipar fyri blákrossmøti. Øll eru vælkomin.

**Sjómanskvinnuringurin í Gøtu**
kemur saman í Gøtubrá mánakvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl 14.30 verður sunnudagsskúli. Kl. 18 verður møti við Harry Hansen - Innsavnan til húsið, og kl. 21 verður ungdómsmøti við Bjarta Johannesen. Evni: Andaktslív.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøld 30. nov.
kl. 22 - Opið Hús.
Sunnudag 2. des. kl. 14 - sunnudagsskúli
kl. 18 - Møti v/ Petur Martin Glerfoss. Streingjakórið syngur,
kl. 21 - Ungdómsmmøti við Øssur Kjølbro.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Oasubrøðurnir.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti og bíbliutími.

**Getsemane, á Brekku 19**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Karstin Justesen og Høgna á Reynatrøð.
Leygarmorgun kl. 10 er morgunbøn.
Sunnnudagin kl. 18 er møti, barnamøti (sunnudagsskúli ) er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 14 Barnamøti
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn- & lovsangur, kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 5. des. kl. 20 bíbliutími Op. 3, 7-13. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow Sandoy**
Jólahugni verður í Samljóð leygarkvøldið 1. des. kl. 19. Allar kvinnur og menn eru vælkomin.

**Demokratia í Skálavík**
Mánakvøldið 3. des kl 20.00 skipar Demokratia fyri almennum fundi í Kelduni í Skálavík. Laura Joensen luttekur á fundinum.

**Aglow Suðuroy**
Jólahugni verður í Fylking á Tvøroyri leygarkvøldið 1/12 kl. 19.30, fyri kvinnur og menn. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Jósvein Hovgård og Ednu Bech. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli kl. 18 møti v/ Ben Eli & Ólavur í Trøðini.

**Behtel, Vágur**
Sunnudagin 2. desember
Kl. 11 Breyðbróting
Kl. 13.30 Sunnudagsskúli
Kl. 18 Møti har Óli á Grømma, trúboðari hjá New Tribes Mission, luttekur.

**Frá Missiónshúsinum í Porkeri**
Leygarkvøldið 1. des kl. 21 verður ungdómsmøti í missiónshúsinum í Porkeri við Símun Jacobsen, presti.
Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Bygdarhúsið í Lopra**
Mánakvøldið verður møti kl. 20, Osvald Kjærbo talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møtini vera hvønn sunnudag kl. 17.00 á Ørkini!

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*tlf. 316491 · fax 316481*
*Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mánadagur 3. des.***
10.00 – 10.30 Fimleikur Grete Ellingsgaard
10.00 - 12.00 Ymiskt handarbeiði v/ Signy og Maritu
14.00 - 16.00 Ymiskt handarbeiði v/Signy og Maritu
11.00 - 11.45 Enskt talumál
14.00 - 17.00 Kortspæl og onnur spøl
Jólaborð verður 5. og 7. des. Kl. 12.00 Tilmelding: 316491
Túrur: 12. des. Verður farið til Leirvíkar at vitja Giljagarð. Úr Steinatúni kl. 13.00 aftur í Havn kl. 17. Kostnaður:120,- Tilmelding: 316491
***Týsdagur 4. des.***
9.00 - 10.30 Internetið (lítið royndir brúkarar) P. Poulsen
10.30 – 12.00 Internetið (royndir brúkarar ) Páll Poulsen
10.00 – 11.30 Vit syngja Óli Vang
Øll eru hjartaliga vælkomin
Málprát - Jóhann H. W. Poulsen
***Mikudagur 5. des.***
9.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Sigrid Dalsgaard
12.00 Jólaborð
Minnist til pakkan til pakkaspælið
15.00 Túrur við ella uttan stavar. Argir – við ánna út eftir Reynagøtu
Randi/Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagur 6. des.***
10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
***Fríggjadagur 7. des.***
10.00 - 13.30 Fyrireiking til jólaborð
12.00 Jólaborð
Minnist til pakkan til pakkaspælið
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00.
Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
tlf. 737795.
Opið er týsdag, mikudag og hósdag, kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
Opið hvønn gerandisdag frá kl. 15-18. Um tygum mangla bil, vinarliga ring 266217.
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir.
***Mánadagin 3. des.***
Fimleikur v/ Jóhannu, felagssangur.
***Týsdagin 4. des.***
Telduhugni v/ Jen Dalsgaard
***Mikudagin 5. des.***
Vit gera jólaprýði v/ Oddvør og Emmu Petersen
***Hósdagin 6. des.***
Myndaveving v/ Gretu Olsen
***Fríggjadagin 7. des.***
Boccia
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Eldrafelagið Borgin**
Hugnaløta verður í Felagslonini í Fuglafirði fríggjakvøldið 7. desember kl. 19.30, har nýggir limir kunnu tekna seg. Aldursmark 50 ár. Veitslan verður 12. januar.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuðurat fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mánadagin 3. dec.***
Vit syngja. Vilhelmin Larsen kemur við harmonikuni.
***Mikudagin 5. dec.***
Vit fara jólaútferð norður eftir. Farið verður úr Tilhaldinum kl. 7.30 við bussi.
Kl. 9.15 fara vit at vitja Hoyvíkskirkjuna, har Katrin Dahl vísir okkum runt.
Kl. 13.00 eta vit døgurða í Sjókafeini í Runavík. Aftaná vitja vit jólastovuna í Orkis og í skíminginі hyggja vit eftir jólaprýði í Æðuvík. Møguleiki verður eisini at »shoppa« eftir vegnum. Kostnaður 300,00 kr. Neyðugt er at melda til á tlf. 211921.

**Pensionistafelagið HØFT**
hevur jólaveitslu í Øravík frí.